FG-002/2022

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

# Frágreiðing

## um løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)

Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins

## Innihaldsyvirlit

Samsvarandi § 7, stk. 4 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi leggur landsstýrismaðurin, áðrenn 20. februar á hvørjum ári, frágreiðing fyri Løgtingið sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.

**1.** Løgtingslóg um sjófeingi. Hvat er sett í verk. Tey mest týðandi økini í tíðarskeiðinum fyri 1. februar 2023.
**2.** Hagtøl um fiskiveiðu.
**3.** Uppboðssølurættindi, menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir.
**4.** Veiðirættindi og avtalur um veiðirættindi.
**5.** Vørn. Støðulýsing innan fiskiveiðieftirlit.
**6.** Havstovan. Støðulýsing av mest týðandi fiskastovnunum.
**7.** Landsstýrismaðurin. Hvørjar ætlanir hevur hann í hyggju at fremja.

## 1. Løgtingslóg um sjófeingi

**Hvat er sett í verk. Tey mest týðandi økini í tíðarskeiðinum fyri 1. februar 2023**
Løgtingslóg um sjófeingi kom í gildi 1. januar 2020. Summar skipanir fingu tó ikki virknað fyrr enn 1. januar 2022.

Á nýggjárinum 2022 var seinasta freist hjá rættindahavarum at knýta síni veiðirættindi at ávísum fiskifari, sum fær veiðiloyvi.

Veiðiloyvið er eitt slag av góðkenning av ávísum fiskifari, sum eigarin fær til at reka vinnuligan fiskiskap. Sama fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men kann hava fleiri fiskiloyvi. Fiskiloyvi ásetir ítøkiligu veiðirættindini hjá einstaka fiskifarinum í einum fiskiári og er avmarkað til tað árið.

Eftir lógini er ikki loyvt at reka vinnuligan fiskiskap uttan veiðiloyvi. Bólkur 5 er tó undantikin kravinum um veiðiloyvi fyri at fáa fiskiloyvi.

Lógin ásetir, at fyri at hava veiðiloyvi, skulu veiðirættindi (t.d. kvotur ella fiskidagar) vera knýtt at fiskifarinum. Sostatt ber ikki til at hava tóm veiðiloyvi. Eigarin av fiskifarinum skal vera heimahoyrandi í Føroyum og lúka treytirnar í lógini um eigaraviðurskifti. Fiskifarið skal somuleiðis vera skrásett í skipaskránni, tað skal hava siglingarloyvi, og tað skal ikki vera skrásett at hava verið partur í ólógligum, óskipaðum og ófráboðaðum fiskiskapi.

Veiðiloyvið er fyritreyt fyri at kunna avhenda egnar fiskidagar ella egnar kvotur millum fiskifør. Í lógini eru eisini reglur um at flyta veiðiloyvi saman við øllum veiðirættindum millum fiskifør.

Sambært sjófeingislógini er veiðiloyvið galdandi til 1. januar 2034. Á hvørjum ári leggur landsstýrismaðurin uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindum skal leingjast við einum ári. Uppskot um at leingja gildistíðina við einum ári varð lagt fyri Løgtingið í november 2022, men málið fall burtur, tá løgtingsval varð útskrivað at vera í desember 2022. Sum er, er eingin ætlan at leggja uppskot fyri Tingið um at leingja gildistíðina, men at varðveita ásetingina um, at veiðiloyvið er galdandi til 1. januar 2034.

Á nýggjárinum 2023 komu reglurnar um brúksskyldu á fiskirættindi í gildi. Tillagingar verða gjørdar í verandi reglum, sum áseta brúkstreyt fyri at avhenda veiðirættindi og í reglunum um generellu brúksskylduna á veiðiloyvi og fiskiloyvi, so tær endurspegla dagsins tørv og eru neyvari og greiðari fyri loyvishavarar og umsiting.

**Atgongd at fiska og skipan av fiskiskapinum**
Fiskiskapurin hjá føroyskum fiskiførum í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv er skipaður við kunngerðum við heimild í løgtingslógini um sjófeingi.

Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at fiskifar hevur veiðiloyvi og fiskiloyvi. Fiskifør minni enn 15 tons nýtast tó ikki veiðiloyvi.

**Fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi**
Botnfiskaveiðan í føroyskum sjógvi er undir fiskidagaskipan. Áður vórðu fiskidagar ásettir í løgtingslógini, men frá og við 2021 ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð fiskidagatal fyri hvørt fiskiár. Hetta skal gerast eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu, sum seta meginreglur um burðardygga stovnsrøkt.

**Egin árskvota**
Fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv er skipaður við egnum árskvotum. Fiskiskapur eftir botnfiski í Barentshavinum, við Ísland, á Flemish Cap og í grønlendskum sjógvi er eisini skipaður við egnum árskvotum. Í 2022 varð fiskiskapurin eftir rækjum við Svalbard skipaður við egnum fiskidøgum, og fiskiskapurin eftir rækjum í russiskum sjógvi varð eisini í 2022 skipaður við egnum kvotum.

**Landing í Føroyum**
Sambært § 41 í sjófeingislógini skal øll veiða á fiskiførum undir føroyskum flaggi landast um bryggjukant í Føroyum; tó kunnu í mesta lagi 15% av veiðuni verða landað uttanlands. Vegna vantandi móttøkukapasitet av svartkjafti í háárstíð er undantak veitt seinastu árini, so heimilað hevur verið at landa svartkjaft uttanlands frá apríl fram til hálvan juni. Nógvur svartkjaftur var eisini í føroyskum sjógvi eftir ársskiftið, og í januar 2023 varð kunngerð lýst, ið veitir undantak frá at skula landa svartkjaft í Føroyum til og við 1. mars 2023.

**Botnfiskur á Føroyabanka í 2022**
Føroyabanki varð friðaður fyri øllum vinnuligum fiskiskapi í 2008, tó so, at loyvt hevur verið útróðrarbátum at royna eftir botnfiski í avmarkað dagatal við snellu, snøri ella tráðu. Í 2022 varð gjørt av at víðka skipanina í vinnuliga fiskiskapinum eftir botnfiski á Føroyabanka. Tvær høvuðsbroytingar vórðu gjørdar: Onnur var, at loyvt varð at royna við línu. Hin var, at línuskip í bólki 3 eisini sluppu inn á Bankan. Ein fiskidagaskipan varð gjørd eftir hesum leisti:

- Fiskifør, sum í 2022 høvdu rætt til fiskiloyvi í bólki 3, fingu 8 fiskidagar í part.
- Fiskifør, sum í 2022 høvdu rætt til fiskiloyvi í bólki 4, fingu 8 fiskidagar í part.
- Fiskifør, sum í 2022 høvdu rætt til fiskiloyvi í bólki 5, kundu royna við línu, snellu, snøri ella tráðu í samanlagt 30 fiskidagar.

Fiskiskapurin hilnaðist væl. Fyribils uppgerðin hjá Vørn vísir, at fiskað vóru tilsamans 2.380 tons av botnfiski á Føroyabanka í 2022. Nógv tað mesta var hýsa – góð 65%. Lítið var av toski, bert 58

tons, svarandi til 2,4% av samlaðu veiðuni. Samlaða avreiðingarvirðið á teimum 2.380 tonsunum av botnfiski var 63,2 mió kr.

**Skipanin av makreli í bólkar og loyvi til heimaflotan**
Eftir makrelkunngerðini í 2022 vóru umleið 32.000 tons av makreli tillutað heimaflotanum.

Hetta er umleið 21% av samlaðu tøku kvotuni til føroysk skip. Við einum settum avreiðingarprísi upp á 7,00 kr./kg er samlaða avreiðingarvirðið av makrelkvotunum til heimaflotan umleið 224 mió. kr.

## 2. Hagtøl um fiskiveiði

Hagtøl um fiskiveiði eru í fylgiskjali 1.

Fiskiveiðieftirlitið hevur gjørt upp veiðuna hjá føroyskum skipum í føroyskum sjógvi og avreiðingarvirðið í 2021 og 2022. Veiðan var tilsamans 331.654 tons í 2021 og 353.496 tons í 2022. Avreiðingarvirðið var tilsamans 1,6 mia. kr. í 2021 og 1,8 mia. kr. í 2022. (Talva 1.1)

Veiðan hjá føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv í 2021 og 2022 er eisini gjørd upp. Veiðan var tilsamans 193.014 tons í 2021 og 263.748 tons í 2022. (Talva 1.2)

Veiðan hjá útlendskum skipum í føroyskum sjógvi, sum eru úr teimum londum, ið Føroyar hava fiskiveiðiavtalu við, er gjørd upp fyri 2021 og 2022. Veiðan hjá útlendskum skipum var 310.568 tons í 2021 og 301.614 tons í 2022. (Talva 1.3)

## 3. Uppboðssølurættindi, menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

**Uppboðssølurættindi**
Samsvarandi ásetingum í avtiknu løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) vóru ávísir partar av føroysku heildarkvotunum av makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum seldir á uppboði í 2018 og í 2019 sum 3 og 8 ára rættindi.

Í § 9 í sjófeingislógini, sum kom í gildi 1. januar 2020, eru ásetingar um, undir hvørjum viðurskiftum hildið verður fram at kunna gagnnýta hesi rættindi. Ásett er eisini, at tá gildistíðin er runnin, verða uppboðssølurættindini útlutað sum egnar árskvotur. Hetta ber í sær, at við árslok 2021 fingu teir rættindahavarar, sum í 2018 og 2019 keyptu kvoturættindi á uppboði fyri 3 ár, lagt rættindini um til egnar árskvotur til egið fiskifar við veiðiloyvi.

Í Talvu 3.1 niðanfyri er sett upp, hvussu nógv av teimum ymisku heildarkvotunum eru umløgd uppboðssølurættindi og 8 ára kvoturættindi, sum eru keypt á uppboðssølum í 2018 og 2019. Tað, sum tilsamans er lagt um til egnar árskvotur 1. januar 2022, eru ávikavist 2,10% av heildarkvotunum av makreli og av norðhavssild, 3,40% av heildarkvotuni av svartkjafti og 1,72% av føroysku kvotunum av botnfiski í Barentshavinum.

| | Umløgd rættindi | 8 ára rættindi keypt á uppboði | |
|---|---|---|---|
| **Fiskaslag/ár** | | **2018** | **2019** |
| Makrelur | 2,10% | 2,40% | 1,80% |
| Norðhavssild | 2,10% | 2,40% | 1,80% |
| Svartkjaftur | 3,40% | 4,00% | 2,80% |
| Botnfiskur í Barentshavinum | 1,72% | 2,44% | 1,80% |

Talva 3.1: Umløgd uppboðssølurættindi og 8 ára rættindi

**Menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir**
Sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) kundi ein partur av tøkari føroyskari kvotu vera settur av til at brúka sum liður í vinnuligum menningarætlanum kring landið. Latast kundu í mesta lagi 8,5% av samlaðu føroysku kvotuni av svartkjafti, makreli og norðhavssild.

Galdandi sjófeingislóg ásetir í § 14, at av tøku føroysku kvotunum av ávikavist svartkjafti, norðhavssild og makreli skulu 8,5% setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49. Menningarkvotur, sum upprunaliga vórðu latnar sambært § 60 í lógini um fyrisiting av sjófeingi, og sum høvdu gildi 1. januar 2020, verða roknaðar av hesi nøgd.

Sjófeingislógin § 10, stk. 3 heimilar landsstýrismanninum í gildistíðarskeiðinum eftir eftirmeting at taka avgerð um at leggja játtaðu menningarkvoturnar um til egnar kvotur, um hann metir, at tær eru virðisskapandi og burðardyggar. Eftir eftirmeting varð avgerð í 2021 tikin um, at av makreli, norðhavssild og svartkjafti vórðu ávikavist 7,29%, 7,38% og 7,79% av føroysku kvotunum løgd um til eginkvotur. Tað, sum ikki er lagt um, verður lutað út til vinnuligar royndir og verkætlanir saman við nøgdunum samsvarandi § 15 í lógini.

Rættindahavararnir kundu so til og við 31. desember 2021 annaðhvørt leggja kvotuna á egið fiskifar, sum tá fekk veiðiloyvi, um tað ikki hevði tað frammanundan, ella kvoturnar vórðu avhendaðar endaliga til eigara av fiskifari við veiðiloyvi, sbr. § 10, stk. 3 í løgtingslógini.

Sjófeingislógin § 49 fevnir um vinnuligar royndir og verkætlanir. Greinin ásetir, at tær nøgdir av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sum eru ásettar í § 14 og § 15 og rættindum sambært § 17 verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Tvær lógarbroytingar viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum eru gjørdar í 2021. Við løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021 (løgtingsmál nr. 100/2020) var sjófeingislógin broytt soleiðis, at kvota til vinnuligar royndir og verkætlanir nú eisini fevnir um ítøkiligt keyp av fiskifari uttan veiðiloyvi. Og við løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 (løgtingsmál nr. 30/2021) eru ásetingar komnar inn í sjófeingislógina, sum geva landsstýrismanninum heimild til at umleggja kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir í tilsagnartíðarskeiðinum, um mett verður, at grundarlag er fyri framhaldandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytirnar annars hava verið hildnar.

Vinnuligar royndir og verkætlanir kunnu býtast í tríggjar bólkar:
1) § 49, stk. 1, 1. pkt.: Verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av fiskasløgunum.
2) § 49, stk. 1, 2. pkt.: Kvotur til ítøkiligt skipakeyp.

3) § 49, stk. 2: Ískoytiskvotur.

60% eru sett av til § 49, stk. 1. (Nýskapandi verkætlanir á landi og til ítøkiligt skipakeyp)
40% eru sett av til § 49, stk. 2. (Ískoytiskvotur)

Ískoytiskvotan verður latin fyri at styrkja um kvotugrundarlagi hjá ávísum fiskiførum. Her er sostatt talan um styrk til teir skipaeigarar í vinnuni, ið ikki hava eitt nóg stórt kvotugrundarlag til at skipa verandi rakstur av ávísum fiskifari. Tað er eisini ein treyt fyri at fáa ískoytiskvotu, at felagið ikki skal hava ræði á meira enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær. Teir stóru aktørarnir í vinnuni kunnu sostatt ikki fáa ískoytiskvotu.

Í 2021 var avgerð tikin um at tilluta ískoytiskvotu av svartkjafti til fýra skip sambært § 49, stk. 2. Talan var um skip, sum eisini høvdu fingið tillutað ískoytiskvotu av makreli og norðhavssild í 2020. Í 2022 fingu sjey skip tillutað ískoytiskvotu.

Allar játtaðu verkætlanirnar hava fingið tilsøgn um kvotu í eitt 5 ára tíðarskeið. Tó verður fiskiloyvi bert latið upp til eitt ár í senn og kann bert verða endurnýggjað, um treytirnar í tilsøgnini eru hildnar.

Í 2022 hava trý skip fingið umlagt ískoytiskvotuna til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslóg um sjófeingi.

## 4. Veiðirættindi og avtalur um veiðirættindi

Føroyar hava, umframt livandi tilfeingið í føroyskum sjógvi, rættindi at veiða uttan fyri føroyskan sjógv.

Yvirlit yvir fiskiveiðiavtalur fyri 2022 og 2023 er í fylgiskjali 2.

Sínámillum fiskiveiðiavtalur eru fyri 2022 og 2023 gjørdar við Ísland, Grønland, Noreg og Russland. Avtalurnar fevna um, at Føroyar fáa rættindi at veiða kvotur í havøkjunum hjá hesum londum í býti við kvotur í føroyskum sjógvi.

Samráðingar hava verið millum Føroyar og ES um fiskiveiðiavtalu fyri 2021 og 2022, men tær bóru ikki á mál, og samráðingarnar um avtalu fyri 2023 eru ikki lidnar.

Føroyar gjørdu fiskiveiðiavtalu við Bretland fyri 2022. Føroyar kundu fiska 750 tons av svartkalva, 1.000 tons av rossamakreli, 400 tons av hýsu og 830 tons av blálongu, longu og brosmu. Føroyar fingu harumframt rætt at fiska 186 tons av toski á Flemish Cap burtur av bretsku kvotuni í NAFO-skipanarøkinum. Í býti fekk Bretland 2.250 tons av toski, hýsu og upsa, 225 tons av blálongu og longu, 75 tons av flatfiski, 10 tons av kongafiski og 500 tons av øðrum botnfiski. Samráðingarnar við Bretland um fiskiveiðiavtalu fyri 2023 eru ikki lidnar.

Føroyar hava í 2022 og 2023 fingið rætt at fiska 5.600 tons av botnfiski í íslendskum sjógvi, harav upp til 2.400 tons av toski við Ísland. Fiskiskapurin eftir brosmu er avmarkaður til 400 tons.

Føroyska kvotan av lodnu í íslendskum sjógvi kann í mesta lagi vera 30.000 tons, men er treytað av heildarkvotuni, sum Ísland ásetir vegna tey trý strandarlondini – Ísland, Grønland og Noreg. Í býti hevur Ísland fingið 1.300 tons av makreli í føroyskum sjógvi. Eisini er avtala gjørd við Ísland um, at føroysk skip kunnu veiða svartkjaft og norðhavssild í íslendskum sjógvi, og at Ísland hevur atgongd at fiska íslendsku kvotuna av svartkjafti og norðhavssild í føroyskum sjógvi.

Føroysk fiskifør kunnu í 2023 veiða 2.500 tons av toski, 375 tons av brosmu og 325 tons av svartkalva í Eysturgrønlandi og 100 tons av svartkalva í Vesturgrønlandi. Hetta eru á leið somu kvotur sum í 2022. Fiskifør kunnu royndarfiska eftir upp til 500 tons av krabba í Eysturgrønlandi. Í býti hevur Grønland í 2023 fingið sum kvotu 6.500 tons av norðhavssild og 18.500 tons av svartkjafti í føroyskum sjógvi, umframt atgongd at veiða í mesta lagi 7.342 tons av svartkjafti, sum er grønlendska kvotan av svartkjafti sambært samtyktini um fiskiskap eftir svartkjafti í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum í 2023.

Í norskum sjógvi í Norskahavinum og í Barentshavinum hava Føroyar í 2023 rætt at veiða 6.945 tons av toski, hýsu, upsa og øðrum botnfiski. Hetta eru somu kvotur sum fyri 2022. Í býti hevur Noreg í 2023 fingið 5.300 tons av botnfiski, sum skal fiskast við línu, og 6.600 tons av makreli í føroyskum sjógvi. Umframt kvotabýtið fáa føroysk skip í 2023 atgongd at fiska 5.450 tons av toski, 500 tons av hýsu og 300 tons av øðrum botnfiski, sum eru fingin til vega í sínámillum avtaluni millum Føroyar og Russland, í norskum sjógvi. Eisini er avtala gjørd við Noreg um, at norsk skip hava atgongd at veiða part av norsku svartkjaftakvotuni í føroyskum sjógvi. Semja var í september 2022 gjørd millum Føroyar og Noreg um makrelatgongd í 2022, har føroysk skip kunnu veiða 10.000 tons av makreli í norskum sjógvi. Somuleiðis kunnu norsk skip veiða sama tonsatal av makreli í føroyskum sjógvi.

Føroysku kvoturnar í russiskum sjógvi í Barentshavinum eru í 2023 13.561 tons av toski og hýsu, 900 tons av flatfiski og 4.000 tons av rækjum. Kvoturnar vóru í 2022 16.699 tons av toski og hýsu, 900 tons av flatfiski og 2.500 tons av rækjum. Í býti hevur Russland í 2022 fingið 72.000 tons av svartkjafti, 13.000 tons av makreli, 7.000 tons av sild og 500 tons av djúpvatnsfiski í føroyskum sjógvi, og atgongd til føroyskan sjógv at fiska part av russisku svartkjaftakvotuni í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum.

Føroyar hava eisini veiðirættindi, sum eru skipað sambært semjum í økisbundnum fiskiveiði-felagsskapum um fiskiskap í altjóða sjógvi.

NAFO (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í útnyrðingspartinum av Norðuratlantshavinum) skipar fiskiskapin uttan fyri kanadiska fiskimarkið. Fyri Føroyar hevur toskurin á Flemish Cap serligan áhuga, umframt fiskiskapur eftir svartkalva og kongafiski. Føroyska toskakvotan er 1.363 tons fyri 2023, í mun til 894 tons fyri 2022. Í 2023 er fiskiskapur eftir rækjum ikki loyvdur í NAFO-skipanarøkinum.

NEAFC (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í landnyrðingspartinum av Norðuratlantshavinum) skipar fiskiskapin í altjóða sjógvi í NEAFC-skipanarøkinum. Føroysk fiskifør kunnu royna í mesta lagi í 341 fiskidagar um árið eftir djúphavsfiski í NEAFC-øki og veiða upp til 150 tons av búrfiski. Veiða eftir kongafiski í Irmingerhavinum hevur ikki verið loyvd síðan 2021. NEAFC hevur ikki kunnað komið ásamt um, hvussu fiskiskapurin eftir kongafiski í altjóða sjógvi í Norðurhavi skal skipast. Føroyar hava loyvt føroyskum skipum at fiska innan fyri eina kvotu, sum hevur verið frammi í uppskotum men tó ikki hevur fingið nøktandi undirtøku at verða samtykt. Áhugin hjá føroyskum

skipum fyri hesum fiskiskapi hevur verið minkandi, og í 2022 varð ongin kunngerð gjørd um henda fiskiskapin.

SPRFMO (Nevndin fyri fiskivinnusamstarv í Suðurkyrrahavinum) skipar fiskiskapin í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum. Føroyska kvotan av rossamakreli í økinum var 8.670 tons í 2021 og í 2022 9.978 tons. Føroysk skip hava ikki fiskað á hesum leiðum síðan 2010. Tí hevur føroyska kvotan í Suðurkyrrahavinum í fleiri ár verið ónýtt. Í 2018 var avtala gjørd við ES um at gera eitt býti, so kvotan varð flutt ES, sum afturfyri flutti Føroyum toskakvotu á Flemish Cap. Síðan 2020 er avtala gjørd millum Føroyar og Kili um, at Føroyar lata Kili føroysku kvotuna.

Fiskiskapur í fiskiverndarøkinum við Svalbard fer fram sambært Svalbardsáttmálanum. Føroyar hava fiskiskap eftir toski og øðrum botnfiski og rækjufiskiskap við Svalbard. Støðið á føroysku toskakvotuni við Svalbard er ásett eftir søguligari veiði hjá føroyskum fiskiførum í einum umboðandi tíðarskeiði, áðrenn fiskiverndarøkið við Svalbard var stovnsett í 1977.

Heildarkvotan hjá Føroyum í 2023 er 1.145 tons av toski í mun til 1.438 tons í 2022. Hýsa, svartkalvi og kongafiskur kunnu einans veiðast sum hjáveiða. Føroysk fiskiskip kunnu veiða rækjur við Svalbard í upp til 922 fiskidagar um árið.

Fyri teir ferðandi fiskastovnarnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild samráðast strandarlondini um skipan av fiskiskapinum. Føroyskur fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski fer fram bæði í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv.

Eftir at Bretland fór úr ES í 2020, eru samráðingar millum strandarlondini um uppsjóvarfiskiskapin víðkaðar við einum parti afturat. Londini hava funnið semju um mest loyvdu veiði av makreli, norðhavssild og svartkjafti fyri 2022 og 2023, sum er ásett samsvarandi ráðgevingini frá ICES (Altjóða ráðið fyri havrannsóknir), men ikki um býtið av heildarkvotuni. Tí hava Føroyar, eins og hini strandarlondini, ásett egnar kvotur av uppsjóvarfiski. Føroyska kvotan av makreli í 2022 var 155.804 tons, av svartkjafti 267.431 tons og av norðhavssild 131.989 tons. Føroysku kvoturnar í 2023 eru fyribils settar til: makrelur 70.000 tons, svartkjaftur 300.000 tons og norðhavssild 50.000 tons. Ósemjan um uppsjóvarfiskastovnarnar ger, at ongar avtalur eru gjørdar við ES og Bretland um sínámillum atgongd at fiska av strandarlandakvotunum inni hjá hvørjum øðrum, men Føroyar og Noreg gjørdu í 2021 og 2022 slíka avtalu teirra millum.

## 5. Støðulýsing viðvíkjandi fiskiveiðieftirliti

**Fiskiveiðieftirlit – ein støðulýsing grundað á frágreiðing frá Vørn/Fiskiveiðieftirlitinum**
Fiskiveiðieftirlitið hevur sambært § 53 í løgtingslóg um sjófeingi eftirlit við, at reglurnar í lógini, og kunngerðir við heimild í lógini, verða hildnar. Samstundis hevur landsstýrismaðurin flutt fleiri uppgávur til Vørn at umsita og avgreiða.

Arbeiðsbyrðan hjá Vørn og Fiskiveiðieftirlitinum er økt munandi við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) og við sjófeingislógini. Játtanin er hækkað nakað seinastu árini. Hóast hetta metir Vørn, at stovninum tørvar munandi bøttar umstøður til fyrisiting og eftirlit, soleiðis at eftirlitið við lógini skal vera mett nøktandi. Tað, at stórar broytingar eru framdar í lógarverkinum í eitt lutfalsliga stutt tíðarskeið, krevur nógv av starvsfólkunum.

Eins og undanfarin ár eru heilt stórar nøgdir av fiski og fiskaúrdráttum landaðar, lagdar á goymslu og umskipaðar við bryggju í Føroyum.

Í 2022 umskipaðu útlendsk skip 252.000 tons til frystifarmaskip í føroyskum havnum. Harafturat løgdu útlendsk fiskiskip 27.230 tons á goymslu.

Afturat hesum var nógvur fiskur landaður til virki í Føroyum í 2022. Tilsamans vórðu 629.869 tons landað í Føroyum. Størstu nøgdirnar eru uppsjóvarfiskur.
Skoytast kann uppí, at føroysk skip landa nakað av fiski í útlondum. Her er talan um uppsjóvarfisk, serliga svartkjaft.

Frávik hevur verið givið frá kravinum um landingar í Føroyum. Trupulleikar hava verið at sleppa framat at landa svartkjaft til framleiðsluvirki ávísan part av árinum, og tí hevur verið loyvt at landa uttanlands.

Í 2022 vóru 54.100 tons landað til útlendsk virki.

Tað, at bretar nú eru uttan fyri ES, og at Bretland tískil er komið afturat teimum pørtum, ið Vørn skal samstarva við, krevur eisini orku hjá Vørn. Tær loysnirnar, ið Vørn áður hevði saman við ES, kunnu ikki altíð brúkast í samstarvinum við bretar.

Hetta ger, at neyðugt hevur verið at nýhugsa loysnir í samband við samstarvið millum Føroyar og Bretland. Nevnast kann, at partarnir hava havt nakað av samskifti um tekniskar loysnir, men enn er ikki komið nakað ávegis. Vit vita kortini, at bretar eru áhugaðir í, at ein skipan við elektroniskum fráboðanum partanna millum skal vera virkin skjótt, helst í hesum árinum. Her er talan um eina tekniska loysn, ið líkist teimum, ið Føroyar hava saman við Noregi, Russlandi og Íslandi. Í løtuni brúka partarnir eina fyribilsloysn.

Bretar eru eisini áhugaðir í, at partarnir semjast um eina samstarvsavtalu, har upplýsingar viðvíkjandi fiskiskapi, eftirliti og hagtølum verða viðgjørd. Sínámillum fundur um hesi viðurskifti verður eftir ætlan tíðliga í vár.

Tá talan er um útflutning av fiski og fiskavørum til Bretlands, eru krøvini, at føroyskir myndugleikar vátta, at fiskiskapurin er farin fram samsvarandi galdandi reglum. Í tí sambandi skal Vørn útvega útflytaranum eina veiðiváttan “Catch Certificate”, ið skal latast myndugleikanum í Bretlandi. Í løtuni eru partarnir samdir um, at ein fyribils skipan verður brúkt.
Báðir partar eru samdir um at fáa eina varandi skipan, ið lýkur treytirnar fleiri ár fram.
Væntandi fer Vørn at hava eina meirútreiðslu av at fremja hesar ætlanir. Enn er ikki nakað neyvt tal at vísa á.

**Eftirlit**
Kravið, um at øll veiða skal um føroyskan bryggjukant, økir sjálvsagt um virksemið í Føroyum og harvið eisini kravið til eftirlitið á landi.

Føroyar hava, í avtalu við Noreg, ES, Bretland, Ísland og Grønland frá november 2022, bundið seg til at gera “full inspection” (fult eftirlit) av 5% av landingunum og 7,5% av nøgdini, sum verður landað av uppsjóvarfiski í Føroyum. “Full inspection” merkir m.a., at eftirlitsfólk skal vera til staðar alla tíðina, meðan landað verður.

Fiskiveiðieftirlitið hevur torført við at liva upp til hetta í løtuni, og tí er neyðugt við fleiri eftirlitsfólkum. 4 eftirlitsfólk eru í fulltíðarstarvi. Í løtuni er neyðugt at nýta manningar á Brimli og Tjaldrinum at gera kanningar á landi. Um fleiri eftirlitsfólk vórðu sett, kundu skipini savna seg um tað, tey eru ætlað til, nevniliga eftirlit til sjós.

Havandi í huga, at fleiri enn 900.000 tons vórðu handfarin við bryggju í Føroyum í 2022, t.v.s. landað og umskipað, so er greitt, at Vørn ikki megnar at halda ásetingarnar, ið vit hava bundið okkum til. Einar 7.300 landingar, frá størri og smærri skipum og bátum, vórðu avgreiddar í føroyskum havnum í 2022.

Tað, at Vørn hevur heimild at seta eygleiðarar umborð á føroysk skip, ið eru til ávísan fiskiskap, og at skipaeigarin ber útreiðslurnar, bøtir um møguleikarnar at reka fiskiveiðieftirlit til havs. Vørn kundi tó hugsað sær, at sama skipan var galdandi fyri øll føroysk skip uttan mun til fiskiskap.

Tað, at útlendsk skip ikki skulu bera útreiðslurnar av føroyskum eygleiðarum, meðan tey fiska í føroyskum sjógvi, ger tað mestsum ógjørligt hjá Vørn at seta eygleiðarar umborð á útlendsk skip.

Tá talan er um eftirlit til sjós, er virksemið avmarkað. Orsøkin er, at Tjaldrið einans er mannað helvtina av árinum. Tjaldrið var bygt í 1976, og tí slepst ikki undan tekniskum avbjóðingum. Tað hevur til tíðir verið trupult at fáa hendur á eykalutum; hetta ger, at skipið liggur nógv meira enn ætlað.

Vørn er av teirri fatan, at nýtt skip átti at verið útvegað ístaðin fyri Tjaldrið.

**Umsiting av fiskiloyvum**
Lógin um fyrisiting av sjófeingi og sjófeingislógin hevur við sær, at tað eru nógv fleiri sløg av kvotum enn áður. Her kunnu m.a. nevnast eginkvotur, uppboðssølukvotur á 1, 3 og 8 ár, menningarkvotur, vinnuligar fiskiroyndir og ískoytiskvotur. Harafturat kunnu hesar kvotur eisini flytast ímillum ár, soleiðis at kvota, ið var keypt í 2018, hevur kunnað verið fiskað í 2019, og menningarkvota latin í 2018 kundi fiskast í 2019 o.s.fr. Talan er um nógv ymisk sløg av kvotum, sum ikki neyðturviliga eru fevndar av somu reglum viðvíkjandi avhending, veiðigjaldi, veiðiøki o.s.fr. Hetta setur stór krøv til umsitingina at halda skil á.

**Kanning av ognarviðurskiftum**
Vørn hevur ábyrgd av at kanna ognarviðurskiftini hjá feløgum, ið reka, ella ætla at reka, vinnuligan fiskiskap í Føroyum. Í hesum sambandi skulu allar broytingar í ognarviðurskiftunum í feløgum, sum reka vinnuligan fiskiskap, góðkennast av Vørn, áðrenn tær verða framdar. Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði.

## 6. Støðulýsing av mest týðandi fiskastovnunum

**Fiskastovnar – ein støðulýsing grundað á frágreiðing frá Havstovuni**

**Vistskipanin á føroyska landgrunninum**
Vistskipanin á føroyska landgrunninum hevur seinastu umleið tíggju árini verið eyðkend av lítlum gróðri og smáum nøgdum av æti, so sum nebbasild. Í 2017 kom tó týðilig broyting í við nógvum

gróðri, og samstundis gjørdist nøgdin av smáari nebbasild tann størsta í umleið 20 ár. Sama var galdandi fyri smáfisk og smáhýsu.

Tó at útlitini fyri tosk og hýsu tóktust góð, gjørdust toskur og hýsa ógvuliga rak í 2019, og samstundis yvirlivdi lítið av tí smáa fiskinum. Møguliga hevur vistskipanin ikki megnað at borið hesar stóru nøgdir av smáfiski. Støðan hevði møguliga verið betri, um nøgdin av stórum fiski hevði verið størri í 2017, sum kundi avmarkað nøgdina av smáum fiski. Sostatt eru ábendingar um, at ov høgt veiðitrýst hevur elvt til eina ójavnvág í vistskipanini.

**Toskur á Landgrunninum**
Gýtingarstovnurin av toski hevur síðan 2006 verið søguliga lítil og var í byrjanini av 2022 mettur til 10 túsund tons, sum er minni enn lágmarkið á 29.226 tons, sum er ásett í umsitingarætlanini. Hetta gjørdi, at teir tillutaðu fiskidagarnir fyri bólk 3-5 vórðu skornir við 5% fyri 2023. Lutfallið millum veiðu og fiskibaran stovn í 2022 var eisini oman fyri mørkini í umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin í byrjanini av 2023 varð mettur til 10 túsund tons og kemur væntandi at halda sær á sama støði komandi tvey árini, har veiðan væntandi verður umleið 4 túsund tons um árið. ICES mælti til onga toskaveiðu í 2023 og 2024, tí toskastovnurin var undir minstamátinum á 17.800 tons. Hetta minstamátið var endurskoðað í 2022.

**Toskur á Føroyabanka**
Toskurin á Føroyabanka er í ferð við at koma fyri seg aftur. Nógv var at fáa í yvirlitstrolingunum í september 2022 og eisini í mars 2020 til 2022. Sum nakað nýtt mælti ICES til eina veiðu av toski á Føroyabanka á 78 tons. Havstovan mælti í tilmælinum fyri 2022 til ein varisligan vinnuligan fiskiskap á Føroyabanka, har línufør av ymsum støddum kundu royna í tilsamans 200 fiskidagar. Havstovan endurtók hetta tilmælið fyri 2023.

**Hýsa undir Føroyum**
Hýsan undir Føroyum vísir nærum somu gongd sum toskurin á Landgrunninum, har stovnurin eisini hevur verið yvirmettur seinastu árini. Tilgongdin í 2016-2018 var frægari enn vanligt. Veiðitrýstið er lækkað nakað seinastu árini og var í 2022 beint oman fyri markið, sum ICES metir gevur størstu varandi veiðu, og var hetta endurskoðað í 2022. Veiðitrýstið var kortini innan fyri mørkini í umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin við ársbyrjan í 2022 er mettur at vera 60 túsund tons, ið er væl meira enn lágmarkið á 22.843 tons, sum er lágmarkið sambært umsitingarætlanini. Gýtingarstovnurin í byrjanini av 2023 er mettur til umleið 79 túsund tons og væntast at vera óbroyttur komandi tvey árini, meðan veiðan væntast at verða 12-14 túsund tons um árið. ICES mælti til eina veiðu í 2023 á 11.853 tons.

**Upsi undir Føroyum**
Upsi undir Føroyum hevur ikki verið fyri sama hóttafalli sum toskur og hýsa, tó at stovnurin hevur verið illa fyri síðan 2010. Tilgongdin seinastu árini tykist at hava verið góð, og gýtingarstovnurin við ársbyrjan 2022 var mettur at vera 51 túsund tons, sum er oman fyri lágmarkið í umsitingarætlanini. Veiðitrýstið er minni enn tað veiðitrýstið, sum gevur størstu varandi veiðu og var hetta endurskoðað í 2022. Veiðan í 2022 í mun til fiskibaran stovn er mett at liggja niðan fyri lágmarkið í umsitingarætlanini. Hetta førdi við sær, at tillutaðu fiskidagarnir vórðu øktir við 5% í 2023 fyri bólk 2 (trolarar). Tað er torført at meta um upsastovnin fram í tíðina, men ábendingar eru um, at gýtingarstovnurin og veiðan fara at vera óbroytt komandi tvey árini. ICES mælti til eina veiðu í 2023 á 17.843 tons.

**Longa undir Føroyum**
Longa undir Føroyum var fyri fyrstu ferð stovnsmett í 2021 við neyvum tonsatølum. Gýtingarstovnurin er øktur seinastu tíggju árini og var í 2022 umleið 19 túsund tons. Veiðitrýstið er oman fyri burðardygga veiðitrýstið, sum ICES hevur ásett. Veiðan í 2023 er mett til umleið 6 túsund tons við verandi veiðitrýsti og kemur væntandi at minka í 2024. Longa er formliga ikki ein partur av umsitingarætlanini fyri tosk, hýsu og upsa á føroyska landgrunninum, men verður fiskað sum hjáveiða. ICES hevur mælt til, at tað í mesta lagi verða fiskað 3.552 tons í 2023.

**Gulllaksur undir Føroyum og vestan fyri Skotland**
Gulllaksur undir Føroyum og vestan fyri Skotland var fyri fyrstu ferð stovnsmettur í 2021 við neyvum tonsatølum. Gýtingarstovnurin hevur verið støðugur í fleiri ár og var í 2022 mettur til 89 túsund tons. Veiðan í 2023 er mett til 18 túsund tons við verandi veiðitrýsti. Veiðitrýstið er niðan fyri burðardygga veiðitrýstið, sum ICES hevur ásett, og ICES mælti til eina veiðu í 2023 á 17.078 tons. Veiðan eftir gulllaksi í føroyskum sjógvi er skipað við eini serstakari kvotaskipan, og hevur kvotan í fleiri ár verið 11.700 tons.

Ritið frá Havstovuni: "Tilmæli um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í 2023" sæst í fylgiskjali 3.

**ICES-tilmælið fyri uppsjóvarfisk 2023**
ICES hevur latið tilmæli um mest loyvdu veiðu fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2023. Mest loyvda veiðan lækkar fyri makrel og norðhavssild, men hækkar nógv fyri svartkjaft.

**Makrelur**
Tilmælið fyri makrel er 782.066 tons fyri 2023, sum er 2% minni enn í fjør. Makrelstovnurin var í vøkstri frá 2007 fram til 2014, men síðan tá hevur hann verið í minking. Stovnsmetingin vísir, at gýtingarstovnurin er 3,8 mió. tons, sum er omanfyri tað, sum sambært umsitingarætlanini er markið fyri, nær neyðugt er at vísa varsemi. Tilgongdin hevur verið góð síðan 2001.

Veiðitrýstið er minkað síðan 2003 og lá fram til 2020 undir hámarkinum fyri, nær mett verður, at veiðan er burðardygg (Fmsy = 0,26). Við nógv øktu veiðuni í 2021 og 2022 er veiðitrýstið farið upp á 0,36, sum er væl oman fyri hámarksvirðið og ájavnt við FPA.

**Svartkjaftur**
Tilmælið fyri svartkjaft er 1.359.629 tons fyri 2023, sum er ein hækking á 81% í mun til tilmælið í fjør. Henda stóra hækking kemst av góðu tilgongdini av árgangunum 2019-2021, og serliga 2020-árganginum, sum er mettur at vera metstórur. Bæði 2019-, 2020- og lutvíst 2021-árgangirnir verða partur av gýtingarstovninum komandi ár.

Gýtingarstovnurin er mettur at vera 6,6 mió. tons, sum er væl oman fyri støddina, har tað sambært umsitingarætlanini er neyðugt at vísa varsemi. Minkingin síðan 2018 er vend til eina hækking í ár, vegna góðu tilgongdina.

Veiðitrýstið er 0,37, sum er oman fyri burðardygga hámarkið (Fmsy = 0,32). Síðan 2014 hevur veiðitrýstið ligið omanfyri, men tó er tað lækkað síðstu árini og nærkast nú burðardygga markinum.

**Norðhavssild**
Tilmælið fyri norðhavssild er 511.171 tons fyri 2023, sum er ein lækking á 15% í mun til 2022. Gýtingarstovnurin hevur verið í støðugari minking frá 2008 til 2020, men góði 2016-árgangurin er

vorðin partur av gýtingarstovninum, og tí kvinkaði hann eitt vet uppeftir í 2021. Hevur verið nøkulunda á sama støði í 2022, men væntast at minka í 2023.

Gýtingarstovnurin er í dag 3,5 mió. tons, sum er beint oman fyri burðardygga markið fyri, nær varsemi skal vísast sambært umsitingarætlanini. Tilgongdin áðrenn og aftan á 2016 er mett at verða vánalig og tí væntast, at gýtingarstovnurin í 2023 fer undir burðardygga lágmarkið.

Veiðitrýstið er vaksið síðan 2015 og er nú 0,192. Hetta er oman fyri hámarkið fyri, nær varsemi skal vísast (Fmsy=0,157) og FPA.

Talva 6.1 niðanfyri vísir ICES-tilmælini um mest loyvdu burðardygga veiðu (tons) fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2023 og broytingarnar í tilmælunum frá 2022 til 2023.

| Fiskastovnur | Tilmæli 2022 | **Tilmæli 2023** | Broyting í tilmæli frá 2022 til 2023 |
|---|---|---|---|
| Makrelur | 794.920 | **782.066** | -2% |
| Svartkjaftur | 752.736 | **1.359.629** | 81% |
| Norðhavssild | 598.588 | **511.171** | -15% |

Talva 6.1: ICES-tilmæli fyri uppsjóvarfisk 2023

Vegna ósemju um býtið av stovnunum hevur fiskiskapurin eftir makreli, svartkjafti og norðhavssild seinastu árini ligið um 25-40% oman fyri vísindaligu ráðgevingina.

## 7. Hvørjar ætlanir eru í hyggju at fremja

Í § 3 í løgtingslógini um sjófeingi verður staðfest, at livandi tilfeingið, harundir arvafrøðiligt tilfar, í føroyskum sjógvi, og tey rættindi Føroyar eiga uttan fyri føroyskan sjógv, er ogn Føroya fólks.

Atgongdin til tilfeingið er skipað soleiðis, at nøkrum fáum er givin framíhjárættur, ein brúksrætt av tilfeinginum til láns – og er tað uppgávan hjá landsins myndugleikum, hjá Løgtingi og Landsstýri, at tryggja, at hetta tilfeingið verður umsitið á skynsaman og burðardyggan hátt, soleiðis at tað skapar virði, menning og framburð kring landið, og at virðini koma fólkinum til góða.

Í samgonguskjalinum er burðardygd ein týðandi táttur – og kann skiljast millum búskaparliga burðardygd, lívfrøðiliga burðardygd og sosiala burðardygd.

Búskaparliga burðardygdin fevnir m.a. um at tryggja vinnuni so góðar karmar sum til ber, soleiðis at virðisøkingin verður so stór sum til ber. Júst virðisøking er eitt øki, sum økt fokus verður sett á við tí fyri eyga at skunda undir eina størri virðisøking av tilfeinginum. Vinnan skal eggjast til at nýskapa, virðisøkja og meirvirka tilfeingið, soleiðis at útflutningsvirðið á tilfeinginum kann økjast munandi komandi árini. Gongd er sett á ætlan við arbeiðinum við virðisøking, og seinni í vár verður ráðstevna, har evnini nýskapan, virðisøking og meirvirking verða sett á breddan.

Búskaparligari burðardygd fevnir eisini um, at eigarin, Føroya fólk, fær ein “munandi og rímiligan part” av tilfeingisrentuni, og er ein dagføring av tilfeingisgjøldunum sett á skrá í Fíggjarmálaráðnum, sum umsitur Veiðigjaldslógina.

Annar partur av búskaparligari burðardygd fevnir um brúksskyldu – í stuttum um, at brúksrætturin, sum vinnan hevur til láns frá Føroya fólki til at gagnnýta tilfeingið, verður brúktur. Skipanin við brúksskyldu kom í gildi 1. januar 2023. Í vár verða tó tillagingar gjørdar í verandi reglum, sum áseta brúkstreyt fyri at avhenda veiðirættindi og í reglunum um generellu brúksskylduna á veiðiloyvi og fiskiloyvi, so tær endurspegla dagsins tørv og eru neyvari og greiðari fyri loyvishavarar og umsiting.

Lívfrøðilig burðardygd snýr seg m.a. um, at fiskiveiðan er skipað lívfrøðiliga burðardygt, bæði undir Føroyum og á leiðum, har stovnar verða umsitnir í felag við onnur lond. Ein grundhugsan, tá umræður lívfrøðiliga burðardygd er, at tilfeingið eisini skal vera atkomuligt hjá okkara eftirkomarum at gagnnýta, soleiðis at vit sum land, eisini í framtíðini, skulu fáa sum mest burturúr tilfeinginum sum frá líður. Umsitingarætlanin fyri fiskidagaskipanina í føroyskum sjógvi verður eftirmett í 2023. Saman við m.a. Havstovuni verður farið undir at viðgera, um og hvørjar tillagingar skulu gerast, serliga við støðuni hjá botnfiskastovnunum undir Føroyum í huga.

Sosial burðardygd fevnir m.a. um, at fiskivinnan skapar so nógv virksemi sum til ber kring landið. Sambært sjófeingislógini skal veiddur fiskur vera atkomuligur fyri fiskavirkini kring landið, men í pørtum av árinum er henda skipan avmarkandi fyri pelagiska flotan, eins og vit hava sæð við svartkjaftinum tíðliga í ár.

Tað er eitt ynski hjá samgonguni at fáa størri gjøgnumskygni og innlit í roknskaparligu viðurskiftini hjá skipunum, sum fáa tillutað tilfeingi frá landinum. Hetta merkir ítøkiliga, at feløg, sum fáa tilfeingi tillutað frá landinum, á hvørjum ári skulu leggja fram sundurgreinaðan roknskap og ognarskrá fyri alt virksemið.

Tá umræður eigaraviðurskiftini í veiðiliðnum, so er samgongan á einum máli um, at bert fyritøkur og persónar, búgvandi og skattskyldig í Føroyum, fáa atgongd í veiðiliðnum. Hetta merkir eisini, at verandi útlendskur ognarskapur skal hvørva, og nýggjur útlendskur ognarskapur verður ikki loyvdur, og verður verandi skipan eisini í hesum sambandi eftirhugd.

Umsetiligheit er ein partur av fiskiveiðiskipanini, har loyvir og rættindi verða avhendað millum partar í vinnuni. Samgongan hevur sett sær fyri, at privata sølan av loyvum og rættindum skal fara fram á gjøgnumskygdum marknaði, og er hetta eisini eitt mál, sum verður sett ígongd í næstum.

At enda, so er tað greitt, at eftirlit og eygleiðingar av fiskiskapinum í føroyskum sjóøki hevur stóran týdning, og av somu orsøk er sett á skrá at styrkja Vørn og at seta í verk skipan við eftirliti og møguleika fyri eygleiðarum umborð á fiskiskipum. Hetta arbeiðið er farið ígongd og er eisini ein partur av fíggjarlógini fyri 2023.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, 16. februar 2023

**Dennis Holm (sign.)**
*landsstýrismaður*